# Ólavsøkan spældi væl av

**Av politistøðini verður sagt, at ólavsøkan hevur verið óvanliga friðarlig. Onkur hendinga gestur hevur sovið rúsin av sær, og onkur brotin rútur er tað, sum fyllir døgnrapportina hjá politinum**

LØGREGLUTÍÐINDI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Ólavsøkan hevur verið óvanliga friðarlig – so friðarlig, at løgreglan kundi agera myndafólk fyri útlendsk ferðafólk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vit føroyingar duga eftir øllum at døma væl at uppføra okkum í verskapi. Í hvussu er letur politiið sera væl at ólavsøkuni í so máta.

Talan hevur verið um eina rættiliga langa ólavsøku. Hon er helst byrjað fríggjadagin hjá summum og onkur var ikki heilt liðugur við tjóðarhátíðina, tá fólk møttu til arbeiðis í morgun.

Men hevur ólavsøkan verið long, hevur hon harfyri verið sera friðarlig.

- Tað hevur verið nógv rennarí eftir fullum fólki, men ongar veruligar illstøður ella slagsmál hava verið skrivað í døgnrapportina. Har, sum tað hevur drigið upp undir slíkar illstøður, hevur tað kortini spælt friðarliga av, sigur vakthavandi á politistøðini.

Tað verður eisini latið væl at býnum í síni heild.

- Tað er stórur munur á, hvussu nógv ruddiligari býurin er, eftir at fólk hava funnið út av, at tey kunnu keypa tað í býnum, sum tey hava brúk fyri. Nú er ikki longur neyðugt hjá fólki at fylla upp í posa og sekk av ølfløskum at hava við sær í býin, og tað sæst aftur, sigur vakthavandi á politistøðini.

Samstundis vísir hann á, at nú plastbikør og øldunkar loysa fløskurnar av, er mundandi minni at síggja av brotnum fløskum, og harvið eisini vandaleysari hjá fólki.

## Stjólu bát

Mest álvarsliga hendingin – burtursæð frá, at ein karusell koppaði – var stuldur av einum báti, sum tveir fullir menn framdu. Teir høvdu brotið inn í tvey neyst í Hoyvíkini, og vóru farnir avstað við einum báti. Men á veg til Havnar vórðu teir steðgaðir av politinum.

Sambært vakthavandi verða teir ákærdir fyri brúksstuldur og fyri at sigla ávirkaðir. Men av tí at MRCC-støðin eisini var blandað upp í málið er møguligt, at teir eisini fáa eina rokning haðani, verður sagt av politistøini.

Umframt hetta blaðaði vakthavandi seg bert fram á tvey smærri herverk, har tveir rútar vórðu brotnir í sonevnda Kumpasshúsinum á Skansanum, har ungdómar høvdu brotið inn.

Annars verður latið væl at úticafeunum í Vágsbotni og á Hvonn, har alt sambært løgregluni er farið friðarliga fram, og eingin vandi hevur staðist av, at cafeirnar liggja nær sjónum.

Eins og undanfarin ár hevur løgreglan eisini í ár verið væl mannað um ólavsøkuna. Og hesaferð hevur hon – tíbetur – víst seg at bundið um heilan fingur.

# Karusell koppaði

**Ein karusell, sum stóð í Nonnuskúlagarðinum, koppaði ólavsøkuaftan. Løgreglan kom á staðið, men hevur latið málið upp í hendurnar á Arbeiðseftirlitinum**

ÓHAPP

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hendi tíbetur eingin álvarsligur skaði, tá karusellin, sum stóð í Nonnuskúlagarðinum um ólavsøkuna, koppaði.

Løgreglan var á staðnum, og teir boðaðu ábyrgdarhavaranum frá, eins og Arbeiðseftirlitið varð boðsent. Av politistøðini verður sagt, at teir neyvan gera meiri við málið, sum er latið upp í hendurnar á Arbeiðseftirlitinum.

Gitingar hava verið frammi um orsøkina til, at karusellin koppaði, men hetta eru bert gitingar, og ikki ber til at siga nakað meiri nágreiniligt, fyrrenn Arbeiðseftirlitið hevur gjørt sínar kanningar. Teir eru í summarfrí í løtuni, og verða ikki aftur til arbeiðis fyrr enn 11. august. Og tá fæst so væntandi nærri at vita, hvør orsøkin var til, at karusellin koppaði.

Sum nevnt vóru børn í karusellini, men eingin fekk álvarsligan snudd, tó at onkur fekk smærri skursl.



*Karusellin, sum stóð í Nonnuskúlagarðinum, koppaði ólavsøkuaftan. Eingin fekk álvarsligan skaða, tó at onkur børn fingu smávegis skursl*

*Mynd: Dagfinn Olsen*